Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	02.12.2025
Mál nr.:	24/04403-24
Málsviðgjørt:	TVR/EHB
Ummælistíð:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	24.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
stuðul til at fyrireika, umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavn Føroya

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at stuðla og at útvega uttanhýsis fígging til at fyrireika, umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavn Føroya.
Stk. 2. Verkætlanin er mett at kosta 70,8 mió. kr. Landskassin fíggjar í mesta lagi 24,3 mió. kr. av verkætlanini, undir hesum til fyrireiking og prosjektering. Írestandi fíggingin verður fingin til vegar við uttanhýsis stuðli.

Stk. 3. Landsstýrisfólkinum verður heimilað í tilsøgn at áseta treytir fyri útgjaldi av landskassastuðlinum sambært stk. 2, 2. pkt.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2030.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Listasavn Føroya hevur leingi havt tørv á umfatandi umvælingum. Síðani 2021 hevur verið arbeitt við at finna fígging til eina framskygda og burðardygga byggiverkætlan, sum skal tryggja, at Listasavnið framhaldandi kann virka sum mentanarligt flaggskip til gagns fyri bæði føroyingar og onnur vitjandi. Listasavnið er tjóðlistasavn Føroya, og savnið er nógv vitjað.

Byggiverkætlanin er mett at kosta 70,8 mió. kr., og ætlanin er, at landið í mesta lagi stuðlar verkætlanini við tilsamans 24,3 mió. kr.

Listasavn Føroya hevur fingið tilsøgn frá útlendskum grunnum um tilsamans 41 mió. kr. til at umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavnið. Tórshavnar kommuna stuðlar verkætlanini við 5,5 mió. kr.

1.2. Galdandi lóggáva
Eingin galdandi materiell lóggáva er á økinum onnur enn eykajáttanarlógin fyri 2023, har tað blivu játtaðar 2 mió. kr. til verkætlanina, og síðani blivu 2,5 mió. kr. játtaðar í 2024 til prosjektering av verkætlanini, harav 2,1 mió. kr. blivu brúktar í 2024. Á fíggjarlógini fyri 2025 eru játtaðar 4,5 mió. kr. til byggiverkætlanina.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at geva Listasavni Føroya tilsøgn um stuðul yvir fleiri fíggjarár, og at Listasavnið harvið kann fáa peningin útgoldnan, tá ið byggingin fer í gongd, væntandi í 1. ársfjórðingi í 2026. Harumframt er endamálið við uppskotinum at geva landsstýrisfólkinum heimild til at játta pening til fyrireiking, umvæling, útbygging og nútímansgerð av Listasavninum. Eftir ætlan er Listasavn Føroya liðugt útbygt í 2028.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Fyrimunurin við uppskotinum er, at Listasavn Føroya fær eina tilsøgn og harvið fulla fígging til verkætlanina, soleiðis at peningurin frá útlendsku grunnunum kann verða útgoldin til verkætlanina. Harumframt er endamálið at geva landsstýrisfólkinum heimild at játta pening og at taka ímóti peningi til fyrireiking, umvæling, útbygging og nútímansgerð av Listasavni Føroya.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Byggiverkætlanin hevur verið til viðgerðar hjá viðkomandi myndugleikum, harundir Yvirfriðingarnevndini og Skógfriðingarnevndini. Øll neyðug loyvi eru fingin til vegar, og Tórshavnar kommuna hevur givið endaligt byggiloyvi 11. november 2025.

Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis, men er gjørt í samráði við Landsverk og Fíggjarmálaráðið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Listasavnið er skipað sum sjálvsognarstovnur og hevur fingið tilsøgn frá grunnum um stuðul upp á tilsamans 41 mió. kr. Augustinus Fonden hevur givið tilsøgn um 17 mió. kr., Louis-Hansen Fonden hevur givið tilsøgn um 17 mió. kr., og Villum Fonden hevur givið tilsøgn um 7 mió. kr. Treytin fyri útgjaldi er tó, at landið átekur sær ein part av fíggingini.

Prosjekteringin varð mett at kosta 4,5 mió. kr., og peningur er játtaður til tað í 2023 og 2024 við ávikavist 2 og 2,5 mió. kr. Harumframt hevur Tórshavnar kommuna játtað at stuðla verkætlanini við 5,5 mió. kr.

Byggiverkætlanin var í útboði um ársskiftið 2024/2025. Bindandi tilboðið frá Búsetur, ið vann útboðið, er galdandi fram til 15. januar 2026 og kann sambært Landsverki helst leingjast til 15. februar 2026 uttan stórvegis frávik.

Við hesi lóg átekur landið sær í alt at fíggja 24,3 mió. kr. yvir tey komandi fíggjarárini, íroknað brúktu upphæddirnar frá 2023 og 2024 áljóðandi 4,1 mió. kr. Mett verður, at umleið 1 mió. kr. verða nýttar í 2025, og sostatt verða 3,5 mió. kr. fluttar fram til 2026. Írestandi stuðulin áljóðandi 15,3 mió. kr. væntast at falla í 2026, 2027 og 2028.

Samlaði fíggjartørvurin til byggiverkætlanina er mettur til 70,8 mió. kr. Metingin er gjørd av Landsverki í november 2025, eftir at komið varð eftir, at upprunaliga metingin frá 2023, sum ljóðaði upp á 60 mió. kr., ikki fór at halda, sí fíggjaryvirlit í fylgiskjali 2.

Ein ítøkilig meting av rakstrarligu avleiðingunum er ikki gjørd, men tað kann væntast, at raksturin fer at økjast nakað sum avleiðing av verkætlanini. Hinvegin fer verkætlanin helst eisini at geva nakrar aðrar inntøkumøguleikar.

Fyri Tórshavnar kommunu verða avleiddar útreiðslur av at skipa og menna økið kring Listasavnið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tá ið talan er um almennan stuðul til ein sjálvsognarstovn, sum hevur rakstrarjáttan á fíggjarlógini, er semja fingin við Fíggjarmálaráðið um, at Landsverk eigur at standa sum byggiharri, meðan Listasavn Føroya er byggiánari. At tað verður hildið neyvt eftirlit við fíggingini og gongdini í málinum verður eisini kravt av grunnunum.

Ein stýrisbólkur er skipaður við umboðum fyri Listasavnið og Landsverk.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið fer sum frá líður av hava jaligar avleiðingar á vinnuna vegna byggivirksemi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Øll bygging hevur avleiðingar fyri umhvørvið, og hetta er einki undantak.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Tá byggiverkætlanin er liðug, fer tað at hava jaliga ávirkan á høvuðsstaðin og restina av landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Tá byggiverkætlanin er liðug, fer at hava sera góða ávirkan á listaliga umhvørvið.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Evropeiski mannarættindasáttmálin, Hoyvíkssáttmálin og Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, eru ikki viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Nei.

2.11. Skattir og avgjøld
Nei.

2.12. Gjøld
Nei.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at veita tilsøgn og at veita stuðul til fyrireiking, umvæling, útbygging og nútímansgerð av Listasavni Føroya.

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Lógargreinin heimilar landsstýrisfólkinum at stuðla verkætlanini at fyrireika eitt nú lendisarbeiði, grevstur o.a., at umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavn Føroya við tilsamans 24,3 mió. kr., íroknað brúktu upphæddirnar frá 2023 og 2024 áljóðandi 4,1 mió. kr. Mett verður, at umleið 1 mió. kr. verða nýttar í 2025, og sostatt verða 3,5 mió. kr. fluttar fram til 2026. Írestandi stuðulin áljóðandi 15,3 mió. kr. væntast at falla í 2026, 2027 og 2028.

Lógargreinin heimilar eisini at tikið verður ímóti uttanhýsis fígging til endamálið.

Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum at áseta treytir í tilsøgn um útgjald av stuðlinum, sum er vanligt.

Til § 2
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2030, soleiðis at tilsøgnin kann standa við, um eitthvørt óvæntað skuldi íkomið, eftir at verkætlanin er komin at enda í 2028.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 2. desember 2025

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Verkætlanarlýsing
Fylgiskjal 2: Fíggjaryvirlit